## … tjóðsangin

– Føroyska tjóðsangin dugi eg tíverri ikki. Men eg vil fegin læra hann. Tað sær eisini betur út í sjónvarpinum, um man syngur við.



## … leiklutin sum innskiftari

– Eg vil altíð gera tað so gott sum gjørligt, líkamikið hvat. Eg vil eisini altíð byrja inni, og eg trúgvi eisini, at tað er soleiðis at liðið fær mest burtur úr mær. Eg eri nevniliga ikki spælarin, sum komi inn og skori mál og soleiðis avgeri dystir. Men at koma inn frá beinkinum er so betur enn einki.

# útbúgvin yrkisleikari



*Tem Hansen sigur, at hann og Christian Lamhauge Holst plaga at trætast um, hvør teirra dugir betur at tosa føroyskt. Mynd: Símun Jóannesarsson*